## Oljan skal til lands

Fylkistingið í Troms í Norðurnoregi krevur, at oljan, sum kemur upp úr havbotninum á Goliat-leiðini, skal upp á land, og at alt virksemið verður stýrt av landi í Norðurnoregi. Tað skrivar Nordlys. Goliat-leiðin er tann fyrsta oljuleiðin í Barentshavinum, sum verður bygd út. Fylkistingið sigur, at lokalir undirveitarar eiga at fáa somu møguleikar sum undirveitarar aðrastaðni í landinum, so norðurnorska vinnulívið fær høvi til at taka lut í útbyggingini.



## Klorið drap síliní

Eitt óhapp í svimjihøllini í íslendsku bygdini Hveragerði fyri nøkrum døgum síðani hevur fingið stórar umhvørvisligar avleiðingar. Óhappið hevði við sær, at 800 litrar av klori runnu út í ánna Varmá, og síðani hava fólk funnið fleiri hundrað deyð síl bæði ovarlaga og niðarlaga í ánni. Fiskifrøðingurin Magnús Jóhannsson sigur við blaðið Vísir, at tað fara at ganga millum fimm og tíggju ár, áðrenn alt klorið er farið úr umhvørvinum.

# Sterkur sambandslisti í Havn



*Fýra kvinnur eru á sambandslistanum í Havn: Ingvør Nolsøe, Jóna Mortensen, Kitty-Mai Ellefsen og Mai-Britt Jacobsen*

**Fýra kvinnur stilla upp á Sambandslistanum í Suðurstreymi**

LØGTINGSVAL

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Føroya Væl, sum er veljarafelagið hjá Sambandsflokkinum í Suðurstreymi, hevði sín triðja og seinasta uppstillingarfund til Løgtingsvalið mikukvøldið.

Fleiri nýggj nøvn eru á listanum – eisini alment kend fólk.

Ingvør Nolsøe í Havn er nýggj á listanum. Hon royndi seg til fólkatingsvalið í november eisini, og tá fekk hon so mikið av atkvøðum, at um talan var um løgtingsval, so varð hon vald.

Georg L. Petersen, sjónvarpsmaður, stillar eisini upp. Hann hevur verið aktivur í politikki fyrr, tá hann var formaður í Ungmannafelagnum Samband. Hann stillaði einaferð upp í Sandoynni, men hevur annars ikki verið virkin í politikki seinnu árini.

Georg L. Petersen hevur verið blaðstjóri og tíðindaleiðari á Dimmalætting í fleiri ár, og hevur seinastu sløku tvey árini starvast sum tíðindamaður í Sjónvarpinum.

Um tað fer at gangast honum eins og Høgna Hoydal og John Johannessen, fer so tíðin at vísa. Hann er sonur Listbeth L. Petersen, løgtingskvinnu og fyrrverandi formann Sambandsfloksin, sum ikki stillar upp hesaferð – so skal familjan varðveita sæti á tingi eftir 102 ár, so er hann møguleikin.

Kitty-Mai Ellefsen er eisini nýggj á listanum. Ellefsen navnið er heldur ikki ókent í politikki. Hon er dóttir Jens Eli Ellefsen í Sandavági, sum fyrr hevur stillað upp fyri Fólkaflokkin. Hon er bróðirdóttir Paula Ellefsen, fyrrverandi formann Sambandsfloksins og Svend Aage Ellefsen, fyrrverandi løgtings- og landsstýrismann Fólkafloksins.

Saman við floksformanninum Kaj Leo Johannesen, fíggjarmálaráðharranum Magna Laksafoss, handilsskúlastjóranum Reidar Nónfjall mynda hesi 12 fólkini ein sterkan sambandslista í Havn.

- Føroya Væl fegnast um, at hugaligt hevur verið at arbeiða við listanum, tí áhugin hevur verið stórur sigur Bjarti Thomsen, formaður í Føroya Væl.

**Valevnini hjá Føroya Væl eru hesi:**

**Tey tólv valevnini eru:**
Annfinn Brekkstein
Kitty May Ellefsen
Hans Albert Hansen
Maj-Britt Jacobsen
Kaj Leo Johannesen
Magni Laksafoss
Høgni Mikkelsen
Jóna Mortensen
Ingvør Nolsøe
Reidar Nónfjall
Georg L. Petersen
Bjarti Thomsen

Miðalaldurin á valevnunum er 44 ár.
Kynsbýtið er:
Kvinnur: 25%
Mannfólk: 75%

# 102 ár við Samuelsen á tingi

**Georg L. Petersen er nýggja skotið hjá Samuelsen-ættini hjá Andrass Samuelsen**

POLITIKKUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Andras Samuelsen sat á tingi frá 1906 til 1950. Hann var Føoyra fyrsti løgmaður eftir heimastýrislógina. Ætt hansara hevur næstan uttan slit umboðað Sambandsflokkin á tingi seinastu 102 árini*



*Georg L. Petersen skal lyfta familjuarvin. Langabbin varð valdur á ting fyri 102 árum síðani, í 1906. Burtursæð frá 1974-78 hevur familjan verið umboðað á tingi øll árini síðani*

Fyri 102 árum síðani var Andras Samuelsen úr Vík valdur á ting fyri nýstovnaða Sambandsflokkin. Hann gjørdist floksformaður í 1924. Hann var eisini føroya fyrsti løgmaður eftir heimastýrislógina í 1948. Hann gavst í politikki í 1950. Hann var sostatt virkin politikari í 44 ár.

Sonur Andras, Trygvi Samuelsen, sakførari í Havn, varð valdur á ting í 1943-46 og fekk aftur sæti á tingi í 1949 og sat fram til løgtingvalið í 1974, tá hann ikki varð valdur. Tá vann Pauli Ellefsen sessin hjá Sambandsflokkinum í Suðurstreymoy í staðin.

Í 1978 var abbasonur Andras, Eilif Samuelsen, valdur á ting, og hann sat til løgtingsvalið í 1990, tá abbadóttir Andras og mamma Georg L. Petersn, Lisbeth L. Petersen, varð vald á ting. Hon hevur sitið síðani og stillar ikki uppaftur hesaferð.

Sostatt hevur ættin hjá Andras Samuelsen havt sæti á tingi seinastu 102 árini – burtursæð frá tíðarskeiðnum 1974 til 1978.

19. januar komandi fer so at vísa, um Georg L. Petersen megnar at lyfta tyngsta politiska arvin í Føroyum.

## Jólasøla í Loungini á Hafnia



Seinasta vikuskifti byrjaði jólasøla í Loungini á Hotel Hafnia, har bæði silvursmykkur, ymiskir træfigurar, bundnar hosur, skóleistar, húgvur og aðrir jólagávulutir eru til keyps. Allar vørurnar eru heimagjørdar.

Opið er 7. og 8. desember og 14. - 15. desember frá kl 15 til 18, um tey enn eiga vøru eftir.